# Christian Mouritsen aftur í HB

Jákup í Stórustovu, umboðsmaður, váttar, at Christian Mouritsen, sum seinastu árini hevur verið knýttur at ungdómsdeildini hjá Manchester City, vendir heim til Føroya og barndómsfelagið HB. Miðvallarin hevur seinastu tíðina verið illa darvaður av skaða, og er ætlanin fyrst og fremst at fáa U21 landsliðsleikaran kláran. – Tá hann er komin fyri seg er ætlanin at royna eydnuna uttanlands aftur. Meira fái eg ikki sagt júst nú, staðfestir Jákup í Stórustovu.



# Galathea var eitt flopp

Tað metir danski undirvísingarmálaráðharrin, Bertel Haarder. Ætlanin við Galathea rannsóknarferðini, sum eisini var framvið í Føroyum og hevði tveir føroyskar fólkaskúlanæmingar við á túrinum, var at varpa øðrvísi ljós á gransking. Men hetta miseydnaðist, metir Bertel Haarder. Verkætlanin kostaði 200 milliónir krónur, og Berterl Haarder undrast nú yvir, hví hvørki fjølmiðlar ella danir sum heild ikki tóku verkætlanina til sín. – Men tað eru ikki fjølmiðlarnir, ið hava ábyrgdina av hesum, men heldur er trupulleikin, at vit høvdu skeivar samstarvsfelagar, sigur Bertel Haarder við Politiken.



*Andrew Heinesen er sannførdur um at vegurin skal liggja her uppi, omanfyri bygdina ...*

# Avgerandi svarið kemur klokkan 21

**Klokkan 10 í morgun fóru leirvíkingar til fólkaatkvøðu at siga sína hugsan um, hvar vegurin gjøgnum bygdina skal liggja – ovarlaga ella niðarlaga. Í kvøld verður greitt, hvør loysn ið fólkið er mest hugað fyri**

FÓLKAATKVØÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Leirvík:** Klokkan var ikki meiri enn 10:03, tá fyrsti veljarin greiddi atkvøðu í hølunum hjá kommununi, sum – ríttiliga apropos! – liggur júst við tann niðara vegin í bygdini.

Íalt hava 644 fólk valrætt, og av hesum eru 18 við ikki-norðurlendskum uppruna.

Áhugin fyri valum er stórur í Leirvík. Vanliga plagar luttøkan at liggja um tey 90 prosentini. Spurningurin er, hvussu verður í dag, nú nógv fólk er farið í summarfrí.

Jacob M. Sólbjørg, formaður í valstýrinum upplýsir fyri Sosialinum, at tey hava fingið ikki færri enn 54 brævatkvøður.

- Hetta er meiri enn vanligt, sigur hann.

Valstaðið letur aftur kl. 20 og síðani verður farið niðan í fimleikarhøllina at telja upp. Úrslitið verður greitt um 9-tíðina í kvøld.

### Ójøvn á máli

Stutt eftir at valhølið lat upp, greiddi Joan Højgaard úr Leirvík atkvøðu.

Hon er sannførd um at rættasta er at leggja vegin her niðri í bygdini.

- Eg hugsi fyrst og fremst um míni egnu børn, tá tey einaferð fara at byggja. Har er so nógv brattari, og tað er – ja, líkasum ein oyggjarvegur, um vegurin kemur haruppi í bygdini!

Hesum er Andrew Heinesen als ikki samdur í. Hann hevur allatíðina verið av teirri sannføring at rættast er at leggja vegin har uppi í bygdini.

Hann heldur ikki, at áskoðanin hjá fólki kann býtast upp eftir kyni ella aldri. Her hava fólk í øllum aldrum sína hugsan um hetta stórmálið fyri leirvíkingar.

Verður vegurin lagdur her niðri í bygdini og við broytingini við havnalagnum fer hetta at fáa keðiligar fylgjur, heldur Andrew:

- Eg vænti, at havnalagið verður so mikið broytt, at tað verður meiri suður í tí, sigur Andrew Heinesen, sum næstu ferð hann fyllir verður 82 ár.

Tá formaðurin í valstýrinum taldi upp, hvussu nógv fólk høvdu verið á vali tann fyrsta tíman, var talið komið upp um 30.

Eingin ivi verður um, at nógvir leirvíkingar og onnur við bíða spentir eftir úrslitinum, tá tað fyriliggur í kvøld.

*.... meðan Joan Højgaard hinvegin er sannførd um at besta loysnin er at leggja vegin niðri í bygdini. – Eg hugsi um børnini, sigur hon*

